# Reglur fyri veitan av stuðuli úr Aktións- og Upplýsingargrunninum

**FELAGSINS AKTIÓNS- OG UPPLÝSINGARGRUNNUR**
Føroya Pedagogfelag hevur ein grunn, nevndan "Aktións- og Upplýsingargrunnurin." Sambært reglugerðini fyri grunnin er endamálið at stuðla limum felagsins undir aktión/verkfalli. Harumframt at granska, styrkja og breiða kunnleika og fatan fyri tí pedagogiska arbeiðinum.

Mannagongd fyri at søkja um stuðul úr A&U grunninum:

**Hvør kann søkja um stuðul úr grunninum?** Limir í Føroya Pedagogfelag kunnu søkja um stuðul úr A&U grunninum.

**Hvat virksemi kann vera stuðlað úr A&U grunninum?** Virksemi, sum er við til granska, styrkja og breiða kunnleika og fatan fyri tí pedagogiska arbeiðinum.

**Nær kann søkjast úr grunninum?** Galdandi frá 1. januar 2017. Søkjast kann 3 ferðir um árið, 1. februar, 1. juni, og 1. oktober. Nevndin hittist fyrsta mánadag eftir, at umsóknarfreistin er farin. Umsøkjararnir fáa svar upp á umsóknina umleið hálvan í tí mánaðinum, søkt verður í.

**Hvussu søkir man úr grunninum?** Umsóknin skal stílast til A&U grunnin: Føroya Pedagogfelag, Tungugøta 1 FO-100 Tórshavn ella *pedagog@pedagogfelag.fo*.
Í umsóknini skal vera ein nágreinilig frágreiðing um, hvat verður søkt stuðul til, og ein kostnaðarmeting skal vera løgd við.
Nevndin fyri A&U grunnin kann áseta ávísar treytir fyri at veita stuðul úr grunninum.

**Nevndin fyri A&U grunnin:** Nevndin er mannað við 3 limum. Einum nevndarlimi, sum nevndin í Føroya Pedagogfelag velur, einum álitisfólki frá dagstovnaøkinum og einum álitisfólki frá serøkinum, sum álitisfólkini velja.

Nevndarlimirnir sita fyri eitt ár í senn. Álitisfólkini velja síni umboð til nevndina fyri grunnin á fyrsta álitisfólkafundi eftir aðalfundin.